**Føroyatíðindi 23/10-1954**

# Syndarlig flúgvuólukka á Trongisvágsfirði

Í dag skuldi ein eingilskur »Sunderland«-flúgvubátur koma á Tvøroyri eftir deyðssjúkum trolaramanni frá »Kingston Amber«. Men tá maskinan um middagsleitið kom higar, lendi hon á Øravík, fór við miklari ferð út móti Tjaldavikshólmi, kom á eina havaldu og stakk so frampartin niður í sjógvin. Fýra menn komu út á vongin og fóru at pumpa ein gummibát. Teir komu sær burt frá maskinuni, sum tá lá lágt í sjónum. »Fagrikletlur« úr Vági var staddur her og saman við smábátum fór hann til hjálpar. Ein róðrabátur úr Øravík tók menninar úr gummibátinum og so var farið at redda teir, ið eftir vóru í flúgvubátinum.

Tað eydnaðist at redda 9 manns, sum vórðu fluttur inn á Tvøroyri. Fimm fóru á sjúkrahúsið og av teimum doyði ein, meðan hinir vóru illa løstaðir. Hinir fýra vóru tó frægir, at teimum nýttist ikki læknahjálp. Eftir í maskinuni vórðu tríggir manns og umkomust teir, tá flúgvubáturin fór undir.

»Fagrikletlur« sleipaði maskinuna nakað inn, men so sakk hon á miðjum fjørði, tó er wirur fastur á henni,

— Hetta var sorgarhending og ein dapur dagur á Tvøroyri. Fløggini veittraðu á hálvari stong og fólk vóru øll sorgarbundin.

— Vit frætta, at eitt eingilskt marinuskip H.M.S. »Pincher« kemur higar í morgin frá Reykjavík.

FØROYATIÐINDI

Nr. 40 30. Okt. 1954

**Flúgvuólukkan við Tjaldavíksholm.**

Sunnudagin kom eingilska herskipið »Pincher« á Tvøroyri fyri at føra teir ið bjargaðust av flúgvubátinum til Englands, og eisini bleiv tann sjúki trolaramaðurin sendur niður við. Ein stór mannamúgva var samankomin á kajuni fyri at vísa sína samkenslu, og alt var kvirt tá ið bilarnir komu fyrst við tí deyða og síðan við hinum sjúka, og bleiv tann deyði fluttur umborð frá bilinum av teimum reddaðu frá flúgvuólukkuni. 2 av manningini blivu eftir á sjúkrahúsinum, men eru nú í batna.

Bjargingin av maskinuni og teimum trimum ið fóru til botns við henni er farin fram hesar seinastu dagarnar, men er nú hildin uppat, tí maskinan er illa sundirfarin og ikki fekkst fatur á tí partinum har menninir vóru í.

Flúgvumaskinan var nú blivin sleipað inn um Lítlahólm við sunnara landi á Trongisvágsfjørðinum, men har er mórubotnur og dykkari, sum var komin norðaneftir, mátti vísa størsta varsemi í sínum arbeiði. Men teir 3 sakraðu frá flúgvuólukkuni eru enn í maskinuni.

— 2 av motorunum eru tiknir upp, hinir tveir vóru skrædnaðir av undir sleipingini.

—

Hetta telegram er komið til chefen fyri føroyska marinudistriktinum kommandør Madsen:

Ovasti leiðarin fyri »Coastal Command« takkar tykkum fyri skjóta og dugnaliga hjálp seinasta leygardag undir ólukkuni í Føroyum. Radiotelegrafistum, myndugleikum, læknum, sjúkrasystrum, fiskimonnum og hartil øllum í Trongisvági hvørs hjálp teir reddaðu frá flúgvubátinum nú munna skylda teirra lív.

**Føroyatíðindi**

Lørdag den 6. November 1954.

---

**Flyveulykken.**

I Anledning af den Lørdagen d. 23. Oktober stedfundne Flyveulykke, vil der med H.M.S. »Welcome« paa Mandag ankomme en Undersøgelseskommission her til Tveraa for at foretage Vidneafhøringer samt eventuelt andre Undersøgelser Ulykken vedrørende.

Kommissionen vil bestaa af følgende Officerer:

Wing com. Mackencie, President sqdr. leader Godby, Flight leut. South, der alle er fra 18. Gruppe, samt Wing com. O'Grady R.A.F. medical officer.

---

FØROYATIÐINDI
Nr. 48 31. Dec. 1954

**Eingilskur flúgvari afturfunnin.**

Ígjár bleiv ein av teimum trimum eingilski flúgvarunum, ið fórust við flúgvumaskinuni á Øravíksfjørði tann 23. oktober, funnin í tí partinum av maskinuni sum var sleipaður inn til Lítlahólm við sunnara landið á Trongisvágsfjørðinum. Eivind Mortensen, ið hevur yvirtikið vrakið, hevði fingið sandbátin »Carlu« til at takað tað upp og var maðurin tá funnin inni í maskinuni. Hildið verður, at hinir tveir munu liggja í tí partinum av maskinuni, sum enn liggur sokkin úti á fjørðinum.

Hesin maðurin, ið funnin varð ígjár, var hin 23 ára gamli flying officer Allan Abercrombi Howatson, navigatør; hann verður grivin í kirkjugarðinum her á Tvøroyri og verður jarðaferðin ímorgin, nýggjársdag, kl. 2½ frá kirkjuni.

FØROYATIÐINDI
Nr. 1 8. Jan. 1955

**Aftur ein av flúgvarunum funnin.**

Í góðveðrinum í vikuni varð arbeitt uppá at bjarga vrakið av eingilsku flúgvumaskinuni og bleiv tá aftur funnið eitt lík; hetta var flúgvupilot John Raymond Hill, sum var giftur og 31 ára gamal. Hann var heldur illa løstaður og fyri at fáa hann upp mátti stólurin, sum hann sat fastspentur í, skerast leysur. Vrakið er so bronglað, at tað væl kan vera, at tann triði maðurin eisini verður funnin her.

— Hin fyrr funni eingilskmaðurin var grivin nýggjársdag og var hetta hátíðarlig jarðaferð; stór mannamúgva var og fylgdi.

**Føroyatíðindi**

Lørdag den 29. Januar 1955.

## THe ROYAL AIR FORCE

wish to convey their gratefull thanks to the following for the action taken and the help afforded to the crew of the Sunderland Aircraft on the occasion of the accident which took place in Trangisvaag fjord on the 23rd of october:

Rigsombudsmanden,
Lagmand and mrs. Kristian Djurhuus,
Sysselmand and mrs. Ejler Djurhuus,
Dr. E. Rubek Nielsen,
Dr. J. Vandborg,
Færøernes Marinedistrikt,
Direktør Georg Thomsen, and
Mr. Eivind Mortensen

also to the crews of the vessels which went to the rescue. To pastor E. Vilhelm, the choir and all those who assisted at the burials and for the lovely flowers received.